# ítróttur

Nr. 40 • mikudagur • 27. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo


# Mortan úr Hørg til VB

**Ungi sumbingurin Mortan úr Hørg fer komandi kappingarár at spæla við VB. Harumframt eru tveir jugoslavar komnir til Vágs saman við nýggja venjaranum**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í Vági brynja teir seg til komandi kappingarár, og tríggir nýggir leikarar eru komnir til felagið.

Mortan úr Hørg, sum seinastu árini hevur spælt við Sumba, hevur valt at royna eydnuna í VB. Mortan er evnaríkur spælari, sum hevur spælt trý kappingarár í 1. deild við Sumba.

Í fjør spældi hann í 2. deild við barndómsfelagnum, men tað eydnaðist ikki sumbingum at endurvinna sætið í 1. deild. Nú hevur hann so leitað sær nýggjar avbjóðingar í grannabygdini Vági.

Mortan úr Hørg, sum er um 20 ára gamal, kann spæla á fleiri plássum, men tá Sumba var í fyrstu deild spældi hann mest sum vongverji.

### Tveir jugoslavar

Umframt Mortan úr Sumba eru tveir jugoslavar komnir til Vágs at spæla. Talan er um Slobodan Madzar, sum er miðvallari, og Nenad Zivanovic, ið er áleypari. Teir eru báðir um 25 ára gamlir.

John Henrik Holm, ið er nývaldur formaður í VB, er fegin um nýggju spælararnar. Tað, sum hann hevur sæð og hoyrt higartil, boðar frá góðum.

VB hevur nú fimm útlendskar leikarar í hópinum. Marek Viersbicki og Robert Cieslewicz úr Póllandi og Slobodan Madzar, Nenad Zivanovic og Predrag Zivkovic úr Jugoslavia.

Marek hevur spælt so leingi í Føroyum, at hann ikki verður roknaður sum útlendingur í fótbóltshøpi. Loyvt er at hava fýra útlendingar á liðnum.

Allir tríggir jugoslavarnir hava spælt á sama liði í heimlandinum, og teir kennast tí væl. Umframt teir fimm leikararnar er venjarin eisini úr Jugoslavia, og hann eitur Dragan Kovacevic. Teir tosa allir enskt, og tí er lætt at samskifta við teir.

### Vilja vera í oddinum

John Henrik Holm viðgongur, at tað kann vera óheppið við so nógvum útlendingum, tí teir troðka vágbingar burtur. Hann ásannar samstundis, at tað er neyðugt, um liðið skal standa seg í kappingini.

– Tað er sera umráðandi at hava ein breiðan hóp. Í fjør høvdu vit nógvar skaddar spælarar, og tað gav okkum trupulleikar, tí hópurin ikki var nóg breiður. Harafturat skal sigast, at útlendsku leikararnir ikki eru sjálvskrivaðir á liðnum, men teir mugu berjast fyri plássinum eins og hinir, sigur John Henrik Holm, formaður.

Hann leggur afturat, at endamálið er at minka um talið av útlendingum, so hvørt sum yngri leikarar taka við, tí VB hevur fleiri góðar leikarar í yngru deildunum.

Men í løtuni verður hildið, at tað er neyðugt av hava styrk út útlondum. Formaðurin er bjartskygdur undan hesum kappingarárinum, og hann metir, at VB hevur eitt sterkt lið, sum kann gera seg galdandi í heimligu kappingini.

VB endaði á fjórða plássi í fjør, og teir gjørdust júst ov stuttir til evropeisku kappingarnar.



*Mortan úr Hørg fer komandi kappingarár at spæla við VB. Harumframt verður VB liðið styrkt við tveimum jugoslavum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Predrag Zivkovic hevur fingið tveir vinmenn úr Jugoslavia til Vágs at spæla komandi kappingarár. Tilsamans fimm útlendingar eru í hópinum hjá VB*

# Neistin møtir Tjaldri

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Í kvøld, mikukvøldið, tekur mansliðið hjá Neistanum ímóti Tjaldri í høllini á Hálsi í Havn. Neistin skal tryggja sær silvurmerkini og halda lív í evarska lítlu vónini um at fanga VÍF. Dysturin verður klokkan 20 í høllini á Hálsi.

Dysturin millum kvinnuliðini hjá Neistanum og Sóljuni, sum skuldi verið leiktur mikukvøldið, er útsettur til hósdagin. Hann verður ístaðin leiktur í Gundadalshøllini í Havn hóskvøldið klokkan 18. Orsøkin er, at vágakvinnur ikki sleppa aftur til Vágarnar mikukvøld.



# Landsliðið á venjingarlegu

**Landsliðið í svimjing hevur verið á venjingarlegu í Fuglafirði um vikuskiftið. Venjarin hevur fyribils valt átjan svimjarar á landsliðið, og hesir eru í góðari venjing, heldur hann**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*



Eftir venjingarleguna hjá svimjilandsliðnum, sum var í Fuglafirði um vikuskiftið, sigur landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, at svimjararnir vístu, at teir eru í góðari venjing, og hann er nøgdur við venjingarleguna.

Svimjararnir hava verið fýra ferðir í hylinum, og teir hava harumframt havt rennitest og styrkivenjing. Tilsamans hava teir svomið 18 kilometrar.

Landsliðið venur aftur í apríl, og tá gongur leiðin til Vágs. Hetta er samstundis liður í fyrireikingum til DKM, sum verður í býnum Nærum í Danmark. Til hesa kappingina fara Andras Thomsen, Jóanes á Fløtti og Elisabeth Rasmussen úr Havnar Svimjifelag.

Hesi trý fara eisini til kappingina Køge Open, ið verður sama vikuskiftið.

## Landsliðið

Ottar í Hjøllum,Flot (Toftir)
Beinir Danielsen, Flot
Per S.Hansen, Flot
Jóanes á Fløtti, HS (Havnar Svimjifelag)
Kristoffur Hentze, HS
Jón Absalonsen, HS
Janus Olsen, HS
Búi Rouch, HS
Egil Gunnarsson, HS
Aksal Norðfoss, HS
Andrass Thomsen, HS
Elisabeth Rassmussen, HS
Helga Djurhuus, HS
Hanus Eysturdal, HS
Karina Peterssen, FS (Fuglafjarðar Svimjifelag)
Jákup Mohr, FS
Sára Eidesgaard, TS (Tvøroyrar Svimjifelag)
Shaila millum Garðarnar, TS

Venjari er Petur Heðin á Fløtti og hjálparvenjari er Malena Hansen

# Dómaraskeið um vikuskiftið

**Fótbóltssambandið skipar um vikuskiftið fyri dómaraskeiði fyri virknar dómarar. Kendi danski dómarin Peter Mikkelsen fer at hava ein fyrilestur á skeiðnum**

DÓMARAR
*Stefan í Skorini*

Dómaraskeiðið verðu hildið komandi vikuskiftið frá fríggjadegi til sunnudag. Skeiðið snýr seg bæði um kropsligan førleika og ástøði um døming.

Fríggjadagin skulu dómararnir til rennitest í høllini á Hálsi, og leygardagin fer danin Peter Mikkelsen at hava sítt fyrsta innlegg.

Dómararnir í 1. deild fara harumframt at viðgera farna kappingarár, og dómarafelagið fer eisini at hava aðalfund.

Leygarmorgunin verður áhugaverdur pallborðsfundur við heitinum “hvussu ynskja vit, at ein føroyskur dómari skal vera í framtíðini”. Við pallborðið sita venjari, ein leikari, ein dómari og ein tíðindamaður.

Jógvan Jensen, Nemus N. Djurhuus og Peter Mikkelsen fara eisini at vísa brot úr dystum og viðgera hesi brot.

Peter Mikkelsen hevur dømt í bæði HM- og EM-endaspølum, og tí verður áhugavert at hoyra, hvat hann hevur at siga um føroyskar dómarar.

# Svimjikapping á Toftum

**Havnar Svimjifelag fekk flest heiðursmerki, tá svimjifelagið Flot skipaði fyri kapping á Toftum um vikuskiftið**

SVIMJING
*Stefan í Skorini*

Fríggjadagin og leygardagin var svimjikapping á Toftum. Seks feløg luttóku í kappingini, og tey vóru Flot, Skeggjar, Havnar Svimjifelag, Vágs Svimjifelag, Tvøroyrar Svimjifelag, Fuglafjarðar Svimjifelag.

Tilsamans luttóku 130 svimjarar, sum allir eru føddir í 1989 ella seinni. Flot sigurí tíðindaskrivi, at kappingin eydnaðist væl, og at fleiri góð úrslit vóru at síggja. Hetta kundi bent á eitt spennandi SUM (Smáunglingameistaraskap), sum verður í apríl.

Havnar svimjifelag fekk flest heiðursmerki við heili seytjan gullmerkjum. Annars var heiðursmerkjabýtið hetta:

| Nr. | Felag | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|---|
| 1 | HS | 17 | 17 | 13 |
| 2 | Skeggjar | 5 | 3 | 4 |
| 3 | FS | 5 | 2 | 5 |
| 4 | TS | 4 | 8 | 2 |
| 5 | FLOT | 2 | 2 | 4 |
| 6 | VS | 1 | 0 | 2 |

# Christoffer vann gull og bronsu

**Christoffer Olsen úr Havn vann tvey heiðursmerki í eini altjóða judokapping í Danmark**

JUDO
*Stefan í Skorini*

Ungi havnarmaðurin gongur í løtuni á miðnámsskúla í Vejen í Danmark, har hann venur nógv judo. Hann var við í kapping um vikuskiftið, og úrslitið var avbera gott.

Christoffer luttók í bólkinum undir 66 kilo. Hann vann henda bólkin og fór við gullinum. Hann kappaðist eisini í einum opnum bólki. Í hesum bólkinum gjørdist hann nummar trý og fekk bronsumerki. Í hesi kappingini vann hann á einum íðkara úr 81 kilo bólkinum, og tað verður mett sum eitt gott úrslit.

Næsta altjóða kappingin hjá Christofferi Olsen verður Limfjords Cup, sum verður í Ålborg á páskum.



*Christoffer Olsen vann um vikuskiftið tvey heiðursmerki í altjóða judokapping í Danmark*